TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Kunngerð

Tað verður við hesum gjørt kunnugt, at býráðið á fundi 31. januar 2002 samtykti,

- at ovasta líðin við Svalbardsvegin, niðanvert við Marknagilsvegin, fær navnið:

**Marknalíð**

- at vegastrekkið til Dalavegin, niðanvert við Marknagilsvegin, fær navnið

**Dalalíð**

- at tey tvey íbúðarhúsini, sum Hanus Olsen, timburmeistari, hevur bygt í Niðarugøtu í Hoyvík, fáa adressuna

**Niðaragøta 2 og Niðaragøta 4**

**Tórshavnar býráð**

SNARSKIVAN

# Til sølu



Hús/summarhús við Limfjørðin, 1 km til strond, partvís útsýni yvir fjørðin, 100 m til buss/handil, 2 km til summarhúsumráði, til sølu møblerað fyri 265.000 kr.

**Tlf. 361148 / 264561**

# Fólk søkist

Søkt verður eftir hjálparfólki til alt fyrifallandi arbeiði á Stóru Dímun.

Best er, um viðkomandi hevur royndir innan landbúnað.

Áhuga kunnu skriva til undirritaða ella ringja á tlf. 319624 at fáa nærri upplýsingar.

**Óla Jákup úr Dímun**
FO-286 St. Dímun

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# FRISØRAR

Treytað av nóg stórari undirtøku, verður skeið hildið í samstarv við

**Helmersens modesalon i Charlottenlund**

Vár- og summarklipp, liting og styling

á skeiðinum nýta vit tilfar av merkinum Goldwell

**Vikuskiftið 9. og 10. mars 2002**

Demonstration:
Leygardag, Tórshavn 9/03 kl. 15.$^{00}$–18.$^{00}$ kr. 1.750,-
Praktik hold I:
Sunnudag, Tórshavn 10/03 kl. 9.$^{00}$–12.$^{00}$ kr. 1.250,-
Praktik hold II:
Tórshavn, sunnudag 10/03 kl. 13.$^{00}$–16.$^{00}$ kr. 1.250,-

**Skeiðleiðari:** *Mette Stanley frá Salong Helmersen.*

**Luttakaratal:** *Leygardagur – óavmarkað*
*Sunnudagur – hægst 10 pr. hold*

**Tilmelding:** *áðrenn 21. februar 2002*

Luttakarar við sveinabrævi innan frisørfakið kunnu fáa helmingin í studningi frá Yrkisdeplinum.

Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin "VITAN", kunnu søkja um stuðul haðani.

Umsóknarbløð til Yrkisdepilin og Vitan fáast á Skeiðsdeplinum.

Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist v.m.), fæst við at venda sær til skúlan á tlf 318813 (mánadag – fríggjadag, kl. 8$^{00}$–12$^{00}$ & 13$^{00}$–16$^{00}$).

**TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN / Skeiðsdepilin við Marknagil**

e-mail: mb@hsh.fo

# Avloysarastarv

Søkt verður eftir einum fólki, at avloysa í Spælistovuni, Útibarnagarðinum og Frítíðarskúlanum á Svangaskarði.

Starvið umfatar avloysing við avspáking og sjúku og verður sett frá 1. apríl 2002.

Umsóknir til starvið skulu verða Nes kommunu hendi í seinasta lagi 25. februar 2002.

Starvið verður lønt sambært sáttmála ímillum Føroya Pedagogfelag og F. K. A.

**Nes kommuna**

## Fráboðan um umhvørvisgóðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 07. februar 2002, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**Smoltstøðina hjá SP/F SÝNIN Í LEIRVÍK**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Føroya landsstýri. Mógulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo .

**Heilsufrøðiliga Starvsstovan**

http://www.sosialurin.fo

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Alt arbeiði verður gjørt, so sum:



- **Útgrevstur, planering**
- **Boring, spreinging**
- **Maskin-, lastvognskoyring**
- **Kloakkarbeiði**

**Sp/f S.G. Contractors**
**Tlf. 320 320**
**Fart. 21 94 95**

Sosialurin -har tað hendir

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2016, Sp/f JC. Solarium, 100 Tórshavn.

Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Claus Vilhelm Christensen, Essalág 13, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: John Vilhelm Christensen, Essalág 13, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 7. februar 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 1139, Sp/f Kristian Djurhuus, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 05.02.2002.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Kristian Djurhuus, Hamarsgøta 13, 100 Tórshavn (formaður), Birgit Djurhuus, Hamarsgøta 13, 100 Tórshavn og Gordon Benjamin Eidesgaard, Oman Stóragarð 6, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.

Skráseting Føroya tann 7. februar 2002

Kristin Balle



**Mentamálastýrið**
*Vinnu- og Miðnámsskúladeildin*

# SJÁLVLESANDI
# Innskriving til students-/HF-próvtøku

Sjálvlesandi, herundir umgangarar, ið á sumri 2002 ætla sær til students- ella HF-próvtøku, skulu í seinasta lagi 25. februar 2002 innskriva seg til próvtøku við tann skúlan/tað skeiðið, har tey ætla sær til próvtøku. Innskrivingarblað at fylla út fæst frá studentaskúlunum og HF-skeiðunum.

Sjálvlesandi skulu rinda 300 kr. fyri hvørja lærugrein, tey innskriva seg til próvtøku í.

Tá ið tann sjálvlesandi hevur verið til próvtøku í tí/teimum lærugrein/um, hann/hon hevur innskrivað seg til próvtøku í, fær hann/hon pengarnar aftur.

9. februar 2002

**Mentamálastýrið**

# Elektrikari



søkist til M/F Norrønu beinanvegin.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Andrias Joensen á tlf. 345900.

**P/F Smyril Line**
Postboks 370
FO-110 Tórshavn

# Til sølu



Toyota Hi-Lux Extra Cap. 2X4 diesel. Frá des. 1994. Myrkabláur. Koyrt 122.000 km. Nýggjan ljóðdoyvara í des. 2001. Rustviðgjørdur annaðhvørt ár. Ongan skaða havt. Prísuppskot 90.000 kr. v/ mvg.

**Tlf. 371563 - 211563**

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Kvøldskeið í AUTOCAD

**25. febr. - 7. mars 2002 kl. 18.00 - 21.15**

**(mánakvøld, týskvøld og hóskvøld)**

Undirvíst verður í: Auto-Cad 2000 (Grundskeið) Skeiðið er fyri fólk, sum lítlar ella ongar royndir hava at við Auto-Cad.

Skeiðleiðari: Suni Dalsgaard, arkitektur

Skeiðkostnaður: kr. 3.500,- íroknað tilfar og matur (skal gjaldast við tilmelding)

Stað: Tekniski Skúli í Tórshavn, í Smiðjugerði (fyrsta hædd, El-deildin)

Tilmelding: **áðrenn 21. februar 2002**

**Handverkarar kunnu søkja stuðul eftir reglugerð um eftirútbúgving av yrkislærdum.**

**Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin "VITAN", kunnu søkja um stuðul haðani.**

Umsóknarbløð til Undirvísingar- og Mentamálastýrið og Vitan fáast á skúlanum.

Boða verður frá luttøku við at venda sær til skúlan á tlf 318813.

**TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN**
**Skeiðsdepilin við Marknagil**
Marknagilsvegur 75, P.O.B. 239,
FO-110 Tórshavn, tlf. 311957, fax 316621
E-mail: mb@hsh.fo

**Fiskimálastýrið**
*Skipaeftirlitið*

# Skipaeftirlitsfólk

Skipaeftirlitið søkir hervið eftir einum skipaeftirlitsfólki til setan skjótast gjørligt.

Skipaeftirlitið er skipað sum deild í Fiskimálastýrinum.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**
- at hava um hendi tekniska málsviðgerð innan nautiska- og skipsbyggitekniska eftirlitsøkið við serligum atliti til fiskiskip og ferðamannaskip.
- at hava umsjón við teimum løggildaðu klassafeløgunum o. ø. feløgum ella persónum, sum hava myndugleika ella eru góðkendir til at gera tekniskar kanningar v.m.
- at hava eftirlit við skipaútgerð
- at hava eftirlit við arbeiðsumhvørvinum umborð á skipum, undir hesum samstarv við vinnuna og aðrar myndugleikar.

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst viðkomandi útbúgving sum t.d.:
- skipsverkfrøðingur
- verkfrøðingur sum er serkønur innan sjóvinnu
- skipsførari við sjóvinnubrævi
- maskinmeistari við víðkaðum maskinmeistaraprógvi og sjóvinnubrævi sum skipsmaskinstjóri
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Tað er somuleiðis krav, at umsøkjarin hevur minst 5 ára starvsroyndir.

Fyrimunur er, um umsøkjari hevur kunnleika til góðskustýring (kvalitetsstýring).

Í starvinum er møguleiki at fáa skipaða eftirútbúgving innan viðkomandi arbeiðsøki og verður sett sum eitt krav, um hetta ikki er lokið.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálastýrið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálastýrinum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Skipaeftirlitinum í hendi í seinasta lagi 18. februar 2002, kl. 15.30.

**Umsóknir skulu sendast til:**
Skipaeftirlitið, Postboks 112, 110 Tórshavn

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum kunnu setast við at ringja til Skipaeftirlitið á tlf. 311188 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen, deildarstjóra.

**SKIPAEFTIRLITIÐ**
J. Broncksgøta 5,
Postboks 112, FO 110 Tórshavn,
Tel.: (+298) 311188 - Fax: (+298) 318882
E-postur: skipaeftirlitid@skipaeftirlitid.fo